# Bíðilistar innan ávísar sergreinar – oktober

## Bíðilistar til knæ- og mjadnaskurðviðgerðir á Landssjúkrahúsinum eru nú partur av uppgerðini hjá Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið fór í juli undir at almannakunngera bíðilistarnar á útvaldum sergreinum. Byrjað verður í smáum og eftir ætlan verða fleiri økir løgd aftrat so hvørt.

Spurningurin um bíðilistar og bíðitíðir er samansettur og tað eru ymsir hættir at seta slíkar upp. Fyri sjúklingin snýr tað seg um at sleppa framat neyðugu viðgerðini sum skjótast, men tað letur seg ikki gera, tá samlaða tilfeingið er avmarkað. Tí standast bíðilistar.

***Er talan um akutta sjúku, fær sjúklingurin altíð viðgerð beinanvegin.***
***Hesir sjúklingar eru ikki við í yvirlitinum yvir bíðilistar.***

**Planløgd serviðgerð á sjúkrahúsinum – fyrsta vitjan**
Vanliga hevur sjúklingurin verið hjá kommunulækna, sum ger eina meting fyrst. Kommunulæknin sendir síðani eina ávísing til sjúkrahúsið og sjúklingurin fær eina tíð til kanning ella viðgerð. Tá ávísingin er móttikin fær sjúklingurin eina tíð til eina forkanning ella eina fyrstu viðtalu.

**Hvat vísa talvurnar?**
Talvurnar vísa samlaða talið av sjúklingum, sum eru settir til eina fyrstu vitjan innan sergreinina, og hvussu leingi hesir hava bíðað. Úrslitini eru sett upp í hóskandi tíðarbil.

**Dømi:** Tann 1. oktober vóru 78 børn og ung á bíðilista til fyrstu viðtalu hjá serlækna barna- og ungdómspsykiatri. Av teimum høvdu 16 staðið á bíðilista í 0-30 dagar tann 1. oktober, 7 høvdu staðið millum 31 og 60 dagar á bíðilista o.s.fr.

### Ortopedi – ryggskurð




**0–3 mánaðir**
49 (41%)

**3–6 mánaðir**
71 (59%)

**6–9 mánaðir**
0 (0%)

**› 9 mðr.**
0 (0%)

### Ortopedi – knø og mjadnar




**0–3 mánaðir**
44 (40%)

**3–6 mánaðir**
46 (41%)

**6–9 mánaðir**
20 (18%)

**› 9 mðr.**
1 (1%)

### Neurologi




**0–2 vikur**
6 (21%)

**2–4 vikur**
3 (11%)

**4–6 vikur**
13 (47%)

**› 6 vikur**
6 (21%)

### ADHD vaksin




**0–3 mánaðir**
14 (10%)

**3–6 mánaðir**
24 (17%)

**6–9 mánaðir**
24 (17%)

**› 9 mðr.**
79 (56%)

### Barna- og ungdómspsykiatri




**0–30 dagar**
16 (21%)

**31–60 dagar**
7 (9%)

**61–90 dagar**
15 (19%)

**› 90 dg.**
40 (51%)

# Aktuellu bíðitíðirnar

Aktuellu bíðitíðirnar eru ein fyribils meting av hvussu leingi ein sjúklingur kann vænta at bíða, um ávísingin verður móttikin á sjúkrahúsinum nú, t.v.s., tá tølini eru gjørd upp. Tað eru stórar óvissur við slíkari fyribils meting nøkur koma at bíða styttri og onnur helst eisini at bíða longur, tí viðurskiftini kunnu broytast, meðan bíðað veður.

| Ortopedi – ryggskurð | Ortopedi – knø og mjadnar | Neurologi | ADHD vaksin | Barna- og ungdómspsykiatri |
|---|---|---|---|---|
| **6** mánaðir | **8–9** mánaðir | **1–1,5** mánaðir | **12–15** mánaðir | **4–5** mánaðir |

# Viðmerkingar til bíðilistarnar

Tíðarskeiðið við koronu hevur ávirkað allar bíðilistarnar, sum eru vorðnir longri og bíðitíðin at koma til fyrstu viðtalu er á summum økjum nú upp í móti tveir mánaðir drúgvari enn áðrenn koronafarsóttin tók seg upp.

**Barna- og ungdómspsykiatriin**
Barna- og ungdómspsykiatriin hevur fingið metnógvar nýggjar ávísingar í 2020 og ávirkar hetta bíðitíðina. Fyri fáum árum síðani var bíðitíðin at koma til útgreiningar longri enn eitt ár.

**Ortopedi – ryggskurð**
Stór framgongd hevur verið innan Ortopedi – ryggskurð eftir, at sergreinin varð tikin heim. Hetta økið varð rættiliga hart rakt av koronu í vár, men tykjast bíðilistarnir hava laga seg. Í juli var mett, at bíðitíðin var meiri enn 9 mánaðir, nú er bíðitíðin niðri á góðum hálvum ári.

**Ortopedi – knø og mjadnar**
Ortopedi – knø og mjadnar er nýggjur bíðilisti í hesum høpi. Gev gætur, at hetta bert fevnir um Landssjúkrahúsið. Tíðin við koronu hevur ávirkað allar skurðviðgerðir og tá trot samstundis er á skurðlæknum, so vaksa bíðilistarnir og bíðitíðin.

**ADHD-vaksin**
Í heyst fór Landssjúkrahúsið undir eitt átak at fáa bíðilistarnar innan ADHD-vaksin niður. Umleið helmingurin av teimum 100, sum tá stóðu á bíðilista, bíða ikki longur, men samstundis eru komnar metnógvar nýggjar ávísingar, so nú standa 141 fólk á bíðilista.

**Neurologi**
Neurologiin hevur verið eitt raðfest øki seinnu árini og bíðitíðin er stytt úr 12 mánaðum niður í minni enn tveir mánaðir. Arbeitt hevur miðvíst við at betra sjúklingagongdirnar og nú vitja neurologiskir konsulentar munandi oftari enn fyrr.